ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Føroyameistaraheitið í billard til Klaksvíkar

Besta billardliðið hjá Klaksvíkar Billardfelag, Kristian Sune Høgnesen og Sonhard Johannessen, vann leygardagin føroyameistaraheitið í billard fyri lið

BILLARD

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Í allan vetur hevur verið sera jøvn kapping um, hvat av bestu liðunum í billard skuldi fara avstað við føroyameistaraheitinum. Bæði Mimir og Tvøroyrar Billardfelag hava givið Klaksvíkar Billardfelag góða kapping, men leygardagin var alt avgjørt, og tá avtornaði, var sokallaða »veteranliðið« hjá Klaksvíkar Billardfelag tað stinnasta og vann gullið.

Teir báðir, ið manna meistaraliðið, eru teir drivnu Kristian Sune Høgnesen og Sonhard Johannessen, sum báðir hava verið partur av billardspælinum í Føroyum í mong ár, umframt at teir bæði saman og sum einstaklingar hava staðið seg framúr væl.

Hetta føroyameistaraheitið hjá klaksvíkingunum er teirra triðja á rað, so sigast má, at teir síðstu árini hava sitið fastir á føroysku billardtrúnuni.

Eygu og met

Seinasti dysturin hjá Klaksvíkar Billardfelag var leygardagin ímóti Mimi, sum eisini hevur tveir veteranar – Steinbjørn í Dali og Jan Müller – á liðnum, og her vunnu klaksvíkingarnir 6-2. Men størsta sigurin í seinasta umfarinum vunnu Max Rasmussen og Óli Joensen, sum spæla fyri Tvøroyrar Billardfelag, tá teir gjørdu eitt ordans hál og vunnu 8-0 á Havnar Klubba.

Endaliga úrslitið gjørdist tí, at Klaksvíkar Billardfelag vann gull og føroyameistaraheiti við 50 stigum. Mimir vann silvur við 42 stigum og Tvøroyrar Billardfelag bronsu við 38 stigum. Havnar Klubbi gjørdist nummar fýra og Klaksvíkar Billardfelag 2 gjørdist nummar fimm í liðkappingini.

Besta spælið í kappingini átti annar av føroyameistarunum, Kristian Sune Høgnesen. Tað var upp á 902 eygu, og somuleiðis átti hann besta einstaka spælið, sum var upp á góð 200 eygu. Steinbjørn í Dali úr Mimi tapti bara tveir dystir í allari kappingina, og tað rakk eisini til eitt met.

Kappast víðari

Hóast liðkappingin nú er av, er framvegis gongd í billardspælinum, tí um vikuskiftið verður kappingin um føroyameistaraheitið fyri einstaklingar, og her er Klaksvíkar Billardfelag vertur. Kappast verður í spildurnýggju hølunum hjá felagnum, sum liggja miðskeiðis millum Klaksvíkar Klubba og KÍ-høllina.

Sum vera man, verða fleiri av kendu andlitunum frá liðkappingini at síggja her eisini, har Kristian Sune skal verja sítt føroyameistaraheiti. Ein av avbjóðarunum er liðfelagin, Sonhard, og eisini verða Steinbjørn í Dali og Max Rasmussen roknaðir millum størstu avbjóðararnar.

Av teimum er Steinbjørn tann einasti, sum enn ikki hevur vunnið føroyameistaraheitið fyri einstaklingar, men hann hevur spælt væl í liðkappingini og fer óivað – saman við hinum – at royna at koppa meistaranum, sum í liðkappingini vísti styrki við 25 eygum í miðal.

Sonhard Johannessen og Kristian Sune Høgnesen vunnu gull í liðkappingini í billard. Hetta var eisini kærkomin gáva at fáa, nú teir júst eru fluttir inn í spildurnýggj billardhøli í gamla verkstaðsbygninginum hjá Einar Mortensen, sála, miðskeiðis millum Klaksvíkar Klubba og KÍ høllina

Mynd: Jan Müller

Endaliga billardstøðan

Nr	Felag	Eygu	Miðal	Stig
1.	Klaksvíkar Billardfelag 1	13.760	21,5	50
2.	Mimir	10.458	16,3	42
3.	Tvøroyrar Billardfelag	9.508	14,8	38
4.	Havnar Klubbi	8.270	12,9	20
5.	Klaksvíkar Billardfelag 2	6.116	9,5	10

FC Amager bjargar Frem frá niðurflyting

Liðið hjá Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen er tryggjað ímóti niðurflyting, nú bæði Køge og síðst FC Amager eru farin á húsagang. Tað hugar tó ikki venjaranum í Frem, tí hetta fer at merkja, at fleiri av dystunum ímóti endanum á kappingini missa týdning

FÓTBÓLTUR

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Hóast húsagangurin hjá FC Amager minkar munandi um niðurflytingarmøguleikan hjá Frem, so missir Frem tveir heimadystir í síðstu trimum umførunum, umframt fitt av áskoðarainntøkum

Hóast kappingin í næstbestu donsku fótbóltsdeildini ikki endar fyrr enn hálvan juni, og 39 stig enn eru at spæla um, tykist við sera stórari vissu greitt, at tey trý niðurflytaraliðini í 1. deild longu eru funnin.

FC Amager, sum liggur triðniðast við 14 stigum, skuldi í dag boða danska sjó- og handilsrættinum frá húsaganginum, sum Todi Jónsson, stjóri í FC Amager, váttaði leygardagin.

Upprunaliga skuldi rætturin fingið fráboðanina í gjár, men av tí at føroyski nevndarlimurin í FC Amager, Heini Zachariassen, var burturstaddur, var formliga innlatingin av umbønini um húsagang útsett til í dag.

Eisini næstniðasta felagið í donsku 1. deild, Køge, sum bara hevði fingið fýra stig, fór fyri skjótt tveimum mánaðum á húsagang, og niðasta liðið, sum er Lolland Falster Alliancen, hevur bara fingið tvey stig í sínum 15 dystum higartil.

Frem er tryggjað

Nøkur pláss oman fyri øll hesi er felagið hjá føroysku landsliðsspælarunum, Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen, Frem, sum við 19 stigum er trý pláss frá niðurflytingarstrikuni.

Av tí at tveir av niðurlytarunum við 100 prosents vissu longu eru funnir, tí FC Amager og Køge verða tvangsflutt niður, samstundis sum Lolland Falster Alliancen ikki sær út til at nytta nakað sum helst, kann næstan sigast mestsum við vissu, at Jón Rói og Atli ikki flyta niður.

Flestu, sum stríðast ímóti at enda ov niðarlaga, vildu helst verið ovurfegin, men venjarin í Frem, Anders Theil, sigur við heimasíðuna bold.dk, at hann fer at sakna nakrar nervapirrandi dystir, og hann sigur tað vera ein miss fyri danskan fótbólt, at feløg fara á húsagang og fleiri av síðstu dystunum í einum kappingarári missa tann týdning, teir kundu fingið.

Eisini vísir hann á, at við húsagangunum hjá FC Amager og Køge missir Frem tveir heimadystir í síðstu trimum umførunum. At tað eisini kostar Frem beinleiðis í krónum og oyrum, grundgevur hann millum annað við, at 2.500 áskoðarar vóru og hugdu, síðst Frem hevði vitjan av FC Amager.